# Guinness í Tórsgøtu

**Nú Brasserie Hvonn letur niðastu hæddina í Tórsgøtu upp, er umbyggingin á gamla Sjómansheiminum av**

BÝARLÍV
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*
*myndir: Jens K. Vang*



*Sally Rasmussen fer at standa fyri nýggju kafeini*

Tað hevur kanska tikið sína tíð. Upprunaliga var tíðarætlanin eisini, at alt skuldi standa liðugt til háarstíðina í summar, men ikki fyrr enn nú er umbyggingin á Sjómansheiminum í Havn um at vera av.

## Egið stað

Men hóast tað hevur tikið sína tíð, so tykist stjórin, Jóhannus Jensen, ikki sørt nøgdur, nú café'in legst afturat matstovuni, sum í eina tíð hevur verið opin.

- Tað kann væl vera, at eg ljóði sum eitt reyp. Men eg haldi veruliga, at vit hava rakt sera væl, tá hetta er lagt til rættis. Konseptið er hugsað sera væl ígjøgnum, og tí rokni eg við, at hetta er nakað, sum fær undirtøku millum manna. Og samstundis haldi eg ikki, at tú kanst kalla okkum ein beinleiðis kappingarneyta til onnur støð í býnum. Sjálvandi virka vit á sama marknaði, men vit hava lagt okkum eftir at skapa nakað øðrvísi, heldur enn bara at kopiera konseptið hjá øðrum, sigur Jóhannus.

## Guiness, cocktails og gott kaffi

Og skjótt er eisini at geva stjóranum rætt. Bara umhvørvið á nýggja staðnum er nakað fyri seg. Í nógvar mátar við einum retrokendum brá úr 70'unum, men samstundis í einum modernaðum hami. Og so stendur eisini skjótt greitt, at tað er krásað fyri smálutunum.

Stórir faltskíggjar, ein veruligur básur til DJ'in, stórur barrdiskur úr hondbukaðum tin, har hópatals kranar geva ølgómanum júst rætta slagið – eisini Guiness – og ein verulig cocktailbarr, sum helst er tann einasta av sínum slag her á landi. Tað Guinesskranin so heilt víst eisini. Enntá tann einasti av sínum slag norðan fyri Hetland. Nevnliga tann blái, sum ber boð um, at her er talan um eina ísakalda útgávu av írska klassikaranum.



*Guinness verður nú skonkt í Tórsgøtu*

## Ikki matstova

Brasserie merkir í veruleikanum bryggjhús, og hóast hetta nógva staðni er vorðið synonymt við matstovur, so leggur Jóhannus dent á, at ætlanin er at hava café'ina og matstovuna í miðhæddini serskildar. Eisini hóast eru sambundnar við eini trappu, sum í sjálvum sær eitt listarverk.

- Samlaða konseptið gevur gestum atgongd frá morgni til myrkurs. Men alt er ikki opið alla tíðina. Og vit vlija heldur ikki, at alt skal vera ein stór matstova. Her inni ber tó sjálvandi til at fáa sær okkurt heilt lætt, men í aðrar mátar er tað kaffi í alskyns útgávum, tertur, ísur og tílíkt, sum er ætlað sum hornasteinurinn í konseptinum. Kanska eitt sindur feminimt, men samstundis eru einstaki málbólkarnir í Føroyum somikið smáir, at tað ikki ber til at satsa einvíst á nichur. Og tí hava vit roynt at skapt nakað fyri øll, sigur Jóhannus.

# Roykjarar mugu út

Talan er um eitt non-smoking stað, sum nú letur upp í Tórsgøtu. Tað er nevnliga als ikki loyvt at roykja á Hvonn-Brasserie, og tað er ein avgerð, sum varð tikin í rættiliga góðari tíð, leggur Jóhannus Jensen dent á.

- Enn er tað so ikki kravt í Føroyum, og taka vit ES, so er Danmark jú veruligur eftirbátur á økinum. Men fyri tað kunnu vit gott hava okkara politikk. Og so vil eg gjarna leggja dent á, at tað fyrst og fremst eru starvsfólkini, sum vit hugsa um í hesum. Longu fyri tveimum árum síðani var hægstirættardómur, sum staðfesti, at passiv royking kann elva til arbeiðsskaðar hjá starvsfólkum á matstøðum, og tað er ein trupulleiki, sum vit vilja gera nakað við.

- Og so hevur tað eisini nakað við trygd at gera, tí veruleikin er eisini, at nærum helmingurin av eldsbrunum á hotellum og matstovum hevur royking sum atvold.

- At tað so eisini eru viðskiftafólk, sum eru fegin um roykfrítt umhvørvi, er bara ein eykavinningur í so máta.

Heilt í skammikrók verða roykjarar tó ikki settir. Oman móti Vágsbotni er ein verulig terassa gjørd, og við eini stórari markisu at verja móti regninum og stórum infra-reyðum hitarum móti kuldanum ber eisini væl til at sita væl uttandura.

**-mørk**

**Stuðul úr JÓLAMERKJAGRUNNINUM**

Sambært viðtøkunum fyri grunnin hevur grunnurin til endamáls at býta út ágóðan av søluni av jólamerkjum, ið Postverk Føroya gevur út á hvørjum ári. Ágóðin verður býttur út sum stuðul til ávís tiltøk til frama fyri børn, til stovnar, feløg o.o., ið virka fyri hesum tiltøkum.

Í serligum føri kann stuðul verða latin til annað enn ávís tiltøk til frama fyri ungdóm, brekað ella onnur samfelagsgagnlig endamál.

Seinnu árini hevur grunnurin á hvørjum ári latið um 500.000 - 600.000 kr. til ymisk vælgerandi endamál.

Síðan 1976 eru góðar 16 mió. kr. latnar í stuðli úr grunninum.

Eitt trímannastýri hevur um hendi leiðslu grunsins og ger av, hvussu ágóðin verður býttur.

Stýrið er ikki bundið av, at umsókn er send, men umsóknir um stuðul úr Jólamerkjagrunninum í ár kunnu sendast grunninum í seinasta lagi 8. des. 2006 og skulu stílast til:

Jólamerkjagrunnurin
Postsmoga 3009
110 Tórshavn

Postverk Føroya